Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 02.05.2024 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari:



| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 17/24 | 24/00172-2 | Gongubreyt í Norðragøtu, matr. nr. a | 2 |
| 18/24 | 24/00252-3 | Frágreiðing og tilmæli - 24/00252 Eykajáttan apríl 2024 | 3 |
| 19/24 | 24/00298-2 | 24/00298 - Víkingur. Frágreiðing og tilmæli | 4 |
| 20/24 | 24/00300-2 | Víðkan av kirkjugarðinum í Norðragøtu Víðkan av kirkjugarðinum í Norðragøtu | 5 |
| 21/24 | 24/00322-2 | Útstykking í Syðrugøtu - Niklasmørk | 6 |
| 22/24 | 24/00329-3 | Broyting av býarplani á Brekkum í Leirvík – nýtt Seyðhúsaøki | 7 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23/24 | 24/00257-3 | 24/00257 - Umsókn um stuðul til Blásastovu. TIlmæli | 8 |
| 24/24 | 24/00265-3 | 24/00265 - Leirvíks Páll. Frágreiðing og tilmæli | 9 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 17/24 Gongubreyt í Norðragøtu, matr. nr. a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.04.2024 | 12/24 | 24/00172-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 29.04.2024 | 12/24 | 24/00172-2 |
| 3 Býráðið | 02.05.2024 | 17/24 | 24/00172-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur avsett pengar til gongubreyt fram við Ánna í Norðragøtu.<br><br>Umsitingin hevur fingið gjørt uppskot, sum partvís er gongubreyt og gøta fram við vegnum, umframt planting og trivnaðarplássum. Gøtan skal kennast sum ein natúrlig gonguleið fram við vegnum. Sí viðfesta uppskot.<br><br>Mælt verður til at taka undir við uppskotinum, bjóða part av arbeiði út og gera sáttmála. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 1.000.000,- kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við tilmælinum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. april 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, við tí ískoyti at gongubreytin skal verða omanfyri bygningin hjá Luna.

**Fíggjarnevnd 29. apríl 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 02. mai 2024**

## 18/24 Frágreiðing og tilmæli - 24/00252 Eykajáttan apríl 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 02.04.2024 | 8/24 | 24/00252-3 |
| 2 Býráðið | 04.04.2024 | 14/24 | 24/00252-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 29.04.2024 | 13/24 | 24/00252-3 |
| 4 Býráðið | 02.05.2024 | 18/24 | 24/00252-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir eykajáttanir.<br><br>Talan erum fleiri ymiskar eykajáttanir fyri íalt 9.215.000,00 kr., harav 7.945.000,00 kr eru til arbeiði sum eru sett gongd ella samtyjkt í 2023, men sum ikki eru liðug enn.<br><br>**Ískoyti 24/4-24**<br>Eingin broyting frá 1. viðgerð |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Samlaðu íløgurnar fyri 2024 hækkað við 9,2 mió. og samlaða RLÙ lækkar við somu upphædd. Men av tí a at 7,9 mió. vóru játtaðar í fjør verður gjaldføri ikki ávirkað av hesum partinum av eykajáttanini. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttanir samb. hjál. yvirlitið á íalt 9.215.000,00 kr. og at peningurin verður tikin av innistandandi. |

**Fíggjarnevnd 02. apríl 2024**
Mæla til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti

**Býráðið 04. apríl 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, umframt at játtað 350 t.kr til Gøtubrá

**Fíggjarnevnd 29. apríl 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

**Býráðið 02. mai 2024**

## 19/24 24/00298 - Víkingur. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 23.04.2024 | 42/24 | 24/00298-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 29.04.2024 | 14/24 | 24/00298-2 |
| 3 Býráðið | 02.05.2024 | 19/24 | 24/00298-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Fóltbóltsfelagið Víkingur søkir um árligan stuðul. Tað gongur væl hjá felagnum og hugburðurin er jaligur. Tó má nevnast, at henda umsóknin í orðing er sera lík tær, ið eru komnar tey seinastu árini. Eingin fíggjarætlan er viðfest<br><br>2022: 600.000 kr<br>2023: 600.000 kr<br><br>Umbiðin upphædd: 600.000 kr |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2024 eru 850.000 kr. settar av til rakstrarkonto 524, “Stuðul til ítrótt”. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita stuðul |

**Mentanarnevndin 23. april 2024**
Mentanarnevndin mælir til at umsøkjarin fær stuðul uppá 600.000 kr. útgoldnan. Harumframt ynskir nevndin, at felagið heldur eina framløgu um virksemi felagsins fyri mentanarnevndini og/ella býráðnum skjótast tilber.

**Fíggjarnevnd 29. apríl 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 02. mai 2024**

## 20/24 Víðkan av kirkjugarðinum í Norðragøtu Víðkan av kirkjugarðinum í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.04.2024 | 13/24 | 24/00300-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 29.04.2024 | 15/24 | 24/00300-2 |
| 3 Býráðið | 02.05.2024 | 20/24 | 24/00300-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Kirkjugarðurin í Norðragøtu er við at fyllast og tí er neyðugt at víðka um kirkjugarðin.<br><br>Í løtuni eru áleið 70 pláss tøk. Í Norðragøtu brúka vit millum 10 – 12 gravir um árið, tí er neyðugt at víðka um kirkjugarðin.<br><br>Lendi skal liggja í 3-5 ár áðrenn man kann gera gravir, og væntandi er at kirkjugarðurin er fullur um áleið 5 ár.<br><br>Umsitingin hevur gjørt uppskot til keyp av jørð, fyri at víðka um kirkjugarðin í Norðragøtu. Talan er um 2755 fermetrar og tað gevur pláss til 488 gravir. (Sí viðfest tekning)<br><br>Núverandi kirkjugarður bleiv seinast víðkaður síðst í 00´inum.<br><br>Umsitingin mælir til at keypa lendi. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. april 2024**
Byggi- býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 29. apríl 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 02. mai 2024**

## 21/24 Útstykking í Syðrugøtu - Niklasmørk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.04.2024 | 14/24 | 24/00322-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 24/00322-2 |
| 3 Býráðið | 02.05.2024 | 21/24 | 24/00322-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur ætlanir um at gera útstykking á Niklasmørk í Syðrugøtu øki er umleið 20.000 fermetrar.

Umsitingin hevur fingið gjørt 3 uppskot til hetta.

Uppskot 1:
Er ein blanding av sethúsum og raðhúsum. Í Uppskotinum eru 8 grundsøkir til sethús, støddin er millum 480 og 630 fermetrar, umframt eru 16 grundøkir til raðhús ið eru umleið 212 fermetrar, umframt er vegur og 1000 fermetrar til alment gagnligt virksemi.

Uppskot 2:
Er best raðhús. Í uppskotinum eru 31 grundøkir til raðhús ið eru umleið 212 fermetrar, umframt vegur og 1000 fermetrar til gagnligt virksemi.

Uppskot 3:
Er ein blanding av raðhúsum og íbúðum. Í uppskotinum eru 14 grundøkir til raðhús ið eru umleið 212 fermetrar, og 5 bygningar við 8 íbúðum í hvørjum bygningi tilsamans 40 íbúðir, umframt vegur og 1000 fermetrar til alment gagnligt virksemi.

Sí viðfesta uppskot.

Umsitingin mælir til at taka av uppskoti 1, tí hetta uppskoti hevur eina blanding av bæði raðhúsum og sethúsum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| Mælt verður til, at taka av tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. april 2024**
Byggi- býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 02. mai 2024**

## 22/24 Broyting av býarplani á Brekkum í Leirvík – nýtt Seyðhúsaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.04.2024 | 15/24 | 24/00329-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 24/00329-3 |
| 3 Býráðið | 02.05.2024 | 22/24 | 24/00329-3 |

| Málslýsing: |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn, um at broyta byggisamtyktina uppá á Brekku í Leirvík.<br><br>Umsitingin hevur gjørt uppskot til nýggja áseting fyri øki N: Seyðhúsaøki í almennu byggisamtyktini. Sí viðfesta skjal.<br><br>Umsitingin mælir til, at góðkenna hesa byggisamtyktina fyri Øki N: Seyðhúsaøki í almennu byggisamtyktini. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. april 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 02. mai 2024**

## 23/24 24/00257 - Umsókn um stuðul til Blásastovu. TIlmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.04.2024 | 20/24 | 24/00257-3 |
| 2 Býráðið | 02.05.2024 | 23/24 | 24/00257-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Gøtu Fornminnissavn søkir um árliga stuðulin fyri 2024 til Blásastovu |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 150.000 kr er settar av til endamálið. Rakstrarkonto 52850, “Blásastova” |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at lata stuðul |

**Mentanarnevndin 09. april 2024**
Mentanarnevndin mælir til, at stuðulin verður útgoldin.

**Býráðið 02. mai 2024**

## 24/24 24/00265 - Leirvíks Páll. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.04.2024 | 22/24 | 24/00265-3 |
| 2 Býráðið | 02.05.2024 | 24/24 | 24/00265-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Stuðulin er til daglian rasktur og íløgu í útgerð og húsið. Ein nýggjur køkur og nýggjar kanoir eru m.a. á ynskilistanum.<br>Tað gongur framhaldandi væl hjá skótunum, vikuliga savnast eini 80 børn har.<br><br>2022: 60.000 vórðu játtaðar<br>2023: 40.000 kr vórðu játtaðar<br><br>Umbiðin upphædd: 50.000 kr |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2024 eru 400.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Stuðul til mentan”.<br>Herav eru d.d. 397.500 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita stuðul |

**Mentanarnevndin 09. apríl 2024**

Mentanarnevndin mælir til at játta skótaliðið Leirvíks Páll 50.000 kr, nú ætlanir eru at umvæla køkin.

**Býráðið 02. mai 2024**

fundurin lokin

---

Per Martin Gregersen

---

Katrin Kjartansdóttir

---

Magnus Skoralíð

---

Marjun Andreasardóttir

---

Rúni Justinussen

---

Marita Klein Joensen

---

Petur Súni Jacobsen

---

Hjalti Dalheim

---

Hanna Jensen